FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Føroya Løgting
Fíggjarnevndin
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Tórshavn, tann: 27. november 2023
J.nr.: 23/20829
Viðgjørt:

Skriv viðv. § 2, stk. 1, í løgtingslóg nr. 179 frá 18. desember 1992 um serligt avgjald á brenniolju

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálaráðnum hevur lagt fyri Løgtingið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju (Skattaumskipan 2024 og 2025, hækking av brennioljugjaldinum). Løgtingsmálið er LM-039/2023.

Fíggjarmálaráðið skal við hesum skrivi greiða frá, hvussu Fíggjarmálaráðið metir, at orðingin í § 2, stk. 1, í løgtingslógini um serligt avgjald á brenniolju skal skiljast. § 2, stk. 1, ljóðar soleiðis: "*Fyri gassolju latin til skip yvir 20 GT skal einki avgjald rindast.*"

Endamálið við § 2, stk. 1, og ætlanin hjá Løgtinginum hevur frá byrjan av verið, at skip yvir 20 GT skulu ikki rinda brennioljugjald, tá tey bunkra olju í Føroyum. Brennioljugjaldið verður eisini umsitið soleiðis í dag, at skip omanfyri 20 GT rinda ikki brennioljugjald, tá tey bunkra olju í Føroyum. Hetta er galdandi bæði fyri gassolju og tungolju.

Verandi praksis og umsiting av brennioljugjaldinum, sum inniber, at skip omanfyri 20 GT ikki rinda brennioljugjald, tá tey bunkra tungolju í Føroyum, samsvara við, hvussu Løgtingið frá byrjan av hevur ætlað, at undantakið í § 2, stk. 1, skal skiljast. Vísast kann til løgtingsmálini LM-191/2011 og LM-028/2010.

Í viðmerkingunum í álitinum í løgtingsmáli LM-028/2010 stendur: "*at TAKS ikki eigur at áleggja avgjald á bunkring av olju, og at bunkring eigur at verða endurgoldin til øll skip.*" Sostatt hevur ætlanin hjá Løgtinginum verið, at øll bunkring av skipum omanfyri 20 GT í føroyskum havnum skal vera frítikin fyri brennioljugjald.

Nógv ymisk heiti eru á ymiskum sløgum av olju, sum kunnu koma í bland. Nevnast kunnu heitini *gassolja*, *brenniolja*, *fýringsolja*, *tungolja*, *fuelolja, diesel, bátadiesel* o.s.fr. Sambært Toll- og vøruskránni er *gassolja* ein undirbólkur undir *tungolju*, sum aftur er ein undirbólkur undir *aðrar miðaltungar oljur*. Fleiri sløg av *gassolju* eru í toll- og vøruskránni, eins og tvey ymisk sløg av *tungolju* eru í toll- og vøruskránni.

Í hesum ítøkiliga førinum er kortini eingin ivi um, at Løgtingið hevur ætlað at undantikið skip omanfyri 20 GT fyri brennioljugjald, sama um tey bunkra gassolju ella tungolju. Fíggjarmálaráðið skal gera vart við, at broytingarnar í løgtingslóg nr. 179 frá 18. desember 1992 um serligt avgjald á brenniolju geva ikki orsøk til at broyta verandi praksis, sum inniber,

at skip omanfyri 20 GT rinda ikki brennioljugjald, tá tey bunkra olju í Føroyum, sama um talan er um gassolju ella tungolju.

Sagt skal vera frá, at TAKS metir, at verandi orðing í § 2, stk. 1 er ógreið. Í hesum umfarinum ber ikki til at broyta í lógaruppskotinum, sum Fíggjarmálaráðið hevur lagt fyri Løgtingið um broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju (løgtingsmál LM-039/2023).

Fyri at nágreina § 2, stk. 1, í løgtingslógini um serligt avgjald á brenniolju ætlar Fíggjarmálaráðið at leggja uppskot til løgtingslóg við endamálinum at broyta orðingina í § 2, stk. 1, til: "*Skip yvir 20 GT rinda ikki avgjøld sambært hesi lóg.*" Hetta verður eftir ætlan gjørt í 2024. TAKS hevur váttað, at verandi praksis verður ikki broytt orsakað av broytingum í løgtingslógini, sum eru lagdar fyri Løgtingið í løgtingsmáli LM-039/2023. TAKS ynskir tó, at § 2, stk. 1, í løgtingslógini verður nágreinað. Fíggjarmálaráðið fer eftir ætlan at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið við hesum endamálinum í 2024.

Fíggjarmálaráðið, 27. november 2023

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum

/Bjarni Askham Bjarnason